Fjaldu herna›arliga útbygging

Ríkisumbo›sma›urin ráddi dønum til at siga ósatt fyri føroyingum, tá amerikumenn skuldu hava radarstø› í Føroyum. Rá›ini vór›u fylgd

HERNA‹ARMÁL
Ey›un Klakstein

Ríkisumbo›sma›urin í Føroyum, Niels Elkær-Hansen, helt ta› vera best, at føroyingar ikki vistu alt um herna›arligu útbyggingina, sum fór fram í fimti- og sekstiárunum.

Elkær-Hansen ráddi á einum fundi í danska uttanríkisrá›num embætismonnum og heryvirmonnum at fjala sannleikan um herna›arútbyggingar fyri føroyingum. Hetta var í sambandi vi›, at amerikumenn skuldu hava Tropo-Scatter-stø›ina í Føroyum, sum ikki var ta› sama sum NATO-stø›in.

Hetta kemur fram í ískoytisfrágrei›ingini til ávegisfrágrei›ingina um føroyska leiklutin í kalda krígnum. Jákup Thorsteinsson, søgufrø›ingur, hevur skriva› frágrei›ingina.

Fjaldu virksemi

Á fundinum í uttanríkisrá›num í 1961 var eingin føroyingur til sta›ar, men bert danskri embætismenn, heryvirmenn og ríkisumbo›sma›urin.

Evni› á fundinum var Tropo-Scatter-stø›in, sum amerikumenn helst vildu hava í Vágum, tí har var flogvøllur. Av politiskum orsøkum vildi Petur Mohr Dam, løgma›ur, ikki gó›taka, at ein n‡ggj herna›arlig stø› var› bygd í Føroyum, men kravdi hana fjalda í virkseminum á Sornfelli.

Niels Elkær-Hansen seg›i á fundinum í uttanríkisrá›num, at ein n‡ggj stø› í Vágum fór at skapa øsing og trupulleikar.

– Um mann hinvegin sigur vi› føroyingar at ein útbygging av NATO-stø›ini var ney›ug, fór ta› neyvan at hava vi› sær stórvegis trupulleikar. At eitt minni tal av amerikumonnum skuldu arbei›a á stø›ini fór heldur ikki føra til mótmæli, seg›i Elkær-Hansen.

Danskar avger›ir

Jákup Thorsteinsson, søgufrø›ingur, vísir á, at hetta er eitt skjalprógva› dømi um, at Elkær-Hansen gav fundarluttakarunum tey rá›, beinlei›is at siga ósatt og dylja sannleikan fyri føroyingum, og hesi rá› vóru fylgd.

- Avger›ir vór›u tiknar Føroyum vi›víkjandi, uttan at føroyingar á nakran hátt vóru umbo›a›ir. Hetta er eitt slag av hjálandast‡ri, sum her kom til sjóndar, sigur Jákup Thorsteinsson í frágrei›ingini.

Ta› er ikki tí, at Føroyar statsrættarliga vóru eitt hjáland, men tí at tann lógin, sum l‡sir Føroyar sum eitt sjálvst‡randi fólkasamfelag í danska ríkinum eisini hevur ta áseting, at kompetansan hjá føroyskum myndugleikum var avmarka› í teimum før›um, tá altjó›a avtalur og skyldur vóru galdandi. Ríkismyndugleikarnir høvdu avger›arrættin í spurningum, sum vi›víkja sambandinum millum danska ríki› og útlandi›.



Ríkisumbo›sma›urin ba› danskar embætismenn og heryvirmenn fjala sannleikan fyri føroyingum, og hesi rá› vór›u fylgd

Strandfer›slan eitt bein í oljuvinnu

OLJUÚTGER‹ARHAVN
Jan Müller



Tá bora› var› í Lopra naka› herfyri hev›i SL ábyrgdina av logistikkinum. Her er Petur Nolsøe frá Smyrli mitt í eldinum.
Mynd jan

Møguleiki er fyri, at Strandfaraskip Landsins kann gerast partur av komandi virksemi í sambandi vi› oljuleiting á landgrunninum. Onkur feløg í Føroyum og í útlandinum, sum ætla sær at vera vi› í útbjó›ingini av virksemi í sambandi vi› oljuútger›arhavn, hava sent Strandfer›sluni fyrispurning, um hon er sinna› at vera vi› í hesum arbei›inum.

Heini á Borg, lei›ari á farmadeildini hjá SL sigur, at ta› er ov tí›liga at siga naka› ítøkiligt um hetta, tí higartil eru teir bidnir um at koma vi› uppl‡singum um trygd og kvalitet í arbei›inum, um útger›, sum er til taks og annars anna›, sum hoyrir til ein firmaprofil.

Talan er um einar sjey ymsar fyritøkur, sum helst fara at bjó›a uppá útger›arvirksemi›. Sosialurin skilur, at fleiri av hesum fyritøkum arbei›a út frá havnini í Havn, og tí er hugsandi, at nettupp Tórshavnar Havn fer at royna at liggja frammaliga, tá avger›in um, hvar útger›arhavnin skal liggja, ver›ur tikin í næstum.

Strandfer›slan skuldi havt gó›ar møguleikar at giva› eitt t‡›andi íkast til eina útger›arloysn. SL hevur, sum hevur drúgvar royndir vi› logistikki, eitt nú í sambandi vi› Norrønu gjøgnum øll árini. Teir hava eisini nógva útger›, sum er t‡›andi partur av virkseminum.

Heini á Borg vil einki siga, um SL ætlar sær at fara upp í hetta virksemi. Hann heldur tó ikki, at naka› er forgjørt í tí, nú teir eisini hava veri› vi› í slíkum arbei›i fyrr og vísir til, at SL hev›i ábyrgdina av logistikkuppgávunum, tá bora› var› í Lopra fyri nøkrum árum sí›ani. Ta› heldur hann gekk væl.

Strí›i› um formannin heldur fram

Fyrrverandi tingma›ur Sambandsfloksins, Atli Hansen, stu›lar Unga Sambandinum í ætlanini um at skifta út formannin í Sambandsflokkinum. Tó er ikki semja um, hvør n‡ggi forma›ur skal vera

SAMBANDSSTRÍ‹
John Johannessen



Gamla strí›i› um hvør skal vera forma›ur í Sambandsflokkinum heldur fram. Á kjaktorginum á heimasí›uni hjá Unga Sambandinum er lívligt or›askifti um formanssessin, og ungmannafelgi› fær stu›ul frá fyrrverandi tingmanninum, Atla Hansen.

Atli Hansen hevur eina drúgva vi›merking í kjaktorginum, har hann rósir ungmannafelagnum fyri at hava tiki› spurningingin um formannin upp aftur. Men Atli Hansen heldur kortini, at Unga Sambandi› átti at lati› vera vi› at peika út n‡ggja formannin beinan vegin.

– Høvdu tit bert bo›a› frá, at tit fóru at seta eitt uppskot fram á komandi landsfundi ella á einum komandi eykaa›alfundi, so kenni eg meg vísan í, at tit høvdu fingi› meira enn eitt evni at valt ímillum, sigur Atli Hansen í vi›merkingini til Unga Sambandi›.

Eingin endurn‡ggjan

Atli Hansen vísir eisini vi› allari vir›ing á, at formansevni›, sum Unga Sambandi› hevur valt, ikki er nøkur endurn‡ggjan fyri flokkin. Unga Sambandi› skjeyt nevniliga fyri knøppum mána›i sí›ani upp, at Lisbeth L. Petersen skuldi gerast komandi forma›ur Sambandsfloksins.

– Eg fari enn einafer› at heita á tykkum, um tykkara evni skuldi tiki› seg aftur ella ikki hevur hug at taka av, so at bo›a frá tí og bí›a eina tí› og vita, um ikki okkurt vísir seg. Eg meini í veruleikanum, at tit áttu at tiki› hetta máli› upp nú og antin kravt eitt svar her og nú ella at taka bo›i› aftur vi› tí grundgeving, at man ynskir at lata fleiri evnir koma framat, sigur Atli Hansen í almennu vi›merkingini til Unga Sambandi›.

Tá Unga Sambandi› gjørdi av at peika á Lisbeth L. Petersen sum n‡ggjan formann fyri Sambandsflokkin var ikki full semja um, at ta› skuldi vera Lisbeth L. Petersen. Tí var› atkvøtt um ymisk evni, og gjørdist úrsiti›, at Lisbeth L. Petersen gjørdist nummar og Alfred Olsen, tingma›ur úr Eysturoynni, gjørdist nummar tvey.

Lisbeth L. Petersen hevur enn ikki svara› Unga Sambandinum, um hon hevur hug at ver›a stilla› upp sum formansvalevni. Men sigur hon nei, fer Unga Sambandi› at av n‡ggjum at umrø›a, um Alfred Olsen skal skjótast upp, sigur Michael Jensen, forma›ur í Unga Sambandinum.

Ónøgd vi› úrlistini

Unga Sambandi› heldur, at Edmund Joensen hevur tænt sínar bestu dagar sum forma›ur fyri Sambandsflokkin, og at flokkinum tørvar ein n‡ggjan formann.

Hesa somu fatan hevur Atli Hansen, sum á›ur í fjølmi›lunum og til landsfundir og a›rar fundir í Sambandsflokkinum hevur víst á sína ónøgd vi› Edmund Joensen sum floksformann.

Atli Hansen heldur ta› vera burturvi› av Edmund Joensen at brósa sær av, at Sambandsflokkurin hevur havt eina framgongd uppá 4 prosent í seinastu veljarakanningunum.

Eingin tosar um, at vit eru farin aftur í tveimum teimum seinastu kanningunum. Bert 4 prosent fram eftir eitt katastrofuval sum seinast er ein katastrofa í sjálvum sær, Heldur Atli Hansen.

Tamt or›askifti um áttatiárini

Tingmenn vóru ikki serliga hvassor›a›ir, tá i› teir vi›gjørdu frágrei›ingina um 80-árini. Myndin er úr tingsalinum seinast í 80-unum

Talan var um eitt tamt og si›iligt or›askifti, tá førdi politikkurin í áttatiárinum í gjár var til vi›ger›ar í løgtinginum

§ 19 FRÁGREI‹INGIN
John Johannessen

Tingfólk hildu seg til sjálva frágrei›ingina og lótu vera vi› at nevna persónar og flokkar, tá uppskoti› um at taka til eftirtektar frágrei›ingina um politikkin í áttatiárunum var til fyrstu vi›ger›ar í tinginum í gjár.

Framsøgufólkini fyri ymsu flokkarnar søgdu seg taka frágrei›ingina til eftirtektar, og vístu á, at ney›ugt er, at politikarar í dag eiga at taka vi› læru av frágrei›ingini, sum sta›festir, at politikararnir í áttatiárunum ikki vóru nóg dugnaligir.

Vi›urkendi sína ábyrgd

Javna›arflokkkurin hev›i politisku lei›sluna meginpartin av áttatiárunum, og er partur av frágrei›ingini tískil meintur móti Javna›arflokkinum, hóast hon ikki sigur ta› beinlei›is.

Forma›ur Javna›arfloksins, Jóannes Eidesgaard, seg›i í framsøgurø›u síni, at flokkur hansara vi›urkennir sær ábyrgdina av førda politikkinum í áttatiárunum og harmast um tær avlei›ingar, i› stó›ust av førda politikkinum.

– Ta› skal eingin ivi vera um, at Javna›arflokkurin svára harmast um alt ta›, sum vit í dag kunnu siga var betur ógjørt. Flokkurin tekur sín part avbyrgdini, og vit taka hetta til eftirtektar vi› einum grei›um ynski um, at vit taka vi› læru av øllum tí, sum ikki átti at veri› hent, seg›i Jóannes Eidesgaard í rø›u síni.

Mugu hava fulla ábyrgd

Eins og politikararnir úr honum flokkunum, tók Annita á Frí›riksmørk úr Tjó›veldisflokkinum í vi›merking eisini undir vi› frágrei›ingini og vóna›i, at politikarar læra av henni.

Men Annita á Frí›riksmørk vísti samtundis á, at ney›ugt er at hava fulla ábyrgd í egnum landi, fyri at kunna taka ábyrgd av førda politikkinum.

Tá Sosialurin fór til prentingar beint eftir middag í gjár var enn nógv eftir av or›askiftinum.

Uppskoti› frá formansskapi løgtingsins um at taka frágrei›ingina frá grein 19 nevndini til eftirtektar var› eftir fyrsti vi›ger› beint í rættarnevndina.

Ov líti› kunna›ir um Smyril Line

Formenninir í bá›um teimum stóru andstø›uflokkunum halda, at tingi› er ov líti› kunna› stø›una, Smyril Line er komi› í

SMYRIL LINE
John Johannessen

Óli Hammer, stjóri í Smyril Line, harma›ist í útvarpinum fríggjadagin um, at umsóknin frá Smyril Line um landskassave›hald ikki kom fyri tingi›, á›renn stø›a var› tikin um at vísa umsóknini burtur.

Men hóast landsst‡ri› hevur víst umsóknini um ve›hald til eitt lán á 30 milliónir krónur frá sær, hava politisku flokkarnir kortini havt møguleikan at leggja uppskot fyri tingi›, um at bjarga Norrønu á einhvønn hátt.

Hendan møguleikan hava tinglimir úr samgonguni ikki n‡tt, tí teir stu›la landsst‡rinum í síni avger›. Men anstø›utinglimirnir hava heldur ikki vilja lagt uppskot fyri tingi› um nakra bjargingarætlan. Teir hava tiki› avger›ina hjá landsst‡rinum til eftirtektar og halda seg vera ov líti› kunna›ir um ætlanir og framrokningar hjá Smyril Line til at hava nakra beinlei›is meining um, hvussu trupulleikin hjá felagnum skal loysast.

– Smyril Line hevur ikki kunna› um verkætlanina vi› n‡ggju Norrønu, heldur ikki víst á framrokningar og onna› líknandi. Tí haldi eg ikki, at ta› ber til at krevja, at politiski myndugleikin brádliga skal tra›ka til og loysa trupulleikarnar, felagi› er komi› í, sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins.

Forma›urin í Sambandsflokkinum, Edmund Joensen, er samdur í, at politisku flokkarnir ikki eru nóg væl kunna›ir um stø›una hjá Smyril Line. Somulei›is vísir hann á, at Sambandsflokkurin heldur ikki ætlar sær at leggja uppskot fyri tingi› um nakra bjargingarætlan.

Stjórin í Smyril Line, Óli Hammer, skuldi á middegi í gjár prógva fyri t‡sku skipasmi›juni, sum byggir n‡ggju Norrønu, at felagi› er nóg sterkt til at kunna rinda skipi›. Fyri at kunna hetta, skuldi Óli Hammer hava fingi› til vega heilar 75 milliónir krónur til at hækka partapeningin í Smyril Line.

Tá Sosialurin fór til prentingar beint eftir døgur›a í gjár, var enn eingin peningur fingin til vega.